# TAÐ HENDIR ...

**LAGT TIL RÆTTIS:** Eyðun Klakstein



## ALEX LETUR SEG ÚR

Danskur strippari, sum kallar seg Alex the Great fer leygarkvøldið at lata seg úr klæðunum til Ladies Night á dansistaðnum Deep í Havn. Alex The Great var við í Talent 2009, og nú kemur hann til Føroya at vísa seg fram.

**ALEX THE GREAT**
Deep í Havn
Leygarkvøldið 16. oktober



## DRÁPSMAÐURIN OG LÍVIÐ

George Clooney spælir leiklutin sum leigudrápsmaður, sum altíð er á ferð aleinur. Hann goymir seg í einari italskari bygd eftir eina uppgávu í Svøríki, og har verður hann vinur við lokal prest og fer at fjasast við Claru. Hetta er stór avbjóðing fyri hann og hansara lív.

**THE AMERICAN**
Biograffilmur
Hósdagin 14. oktober




## TÁ DEYÐIN VERÐUR AVDÚKAÐUR

Tíðindamaðurin og rithøvundurin, Høgni Mohr, hevur givið út bók um tíðina, hann var á landssjúkrahúsinum og eygleiddi lívið frá føðing til deyða. Tekstirnir røkka heilt frá tí, at ein genta verður fødd, til at líkið av einum bráðdeyðum manni verður skorið upp.

**HØGNI MOHR**
**Tá deyðin verður avdúkaður**
Øgiliga egið forlag



## GUDFRØÐINGUR VITJAR BRØÐURNAR

Í døgunum frá 16. til 25. oktober vitjar David R. Reid, vísindamaður og gudfrøðingur, Brøðasamkomuna. David Reid fer at hava fyrilestrar í samkomum kring landið um trúvirði Bíbliunnar. Dr. David hevur arbeitt sum vísindamaður innan gransking av millum annað bjálvingartilfari, sum verður brúkt uttaná rúmdarrakettum. David hevur doktaraheiti innan sama øki og er eisini útbúgvin gudfrøðingur. David og konan Margaret vitja í Suðuroynni, Havnini, Eysturoynni og í Klaksvík.

**DAVID R. REID**
16/10-25/10



## UPPFLYTINGIN SKAL FEIÐRAST

Leygardagin verður seinasta umfar í 1. deild hjá monnum spælt. Uppflytararnir til bestu deildina eru funnir – tað eru 07 Vestur og KÍ – og leygardagin skal endaliga støðan í deildini staðfest. Eftir dystirnar verða heiðursmerkini handað, og tá kunnu uppflytararnir so feiðra síni pláss í Vodafonedeildini næsta kappingarár. Bæði 07 Vestur og KÍ spæla á heimavølli leygardagin kl. 14.30.

**FÓTBÓLTUR**
1. deild menn endar
Leygardagin 16. oktober kl. 14.30

## FØROYSK MENTAN Í KEYPMANNAHAVN

Føroyahúsið verður aftur í ár karmur um eitt føroyskt mentanarkvøld, nú mentanarnátt verður í Keypmannahavn fríggjakvøldið. Tónleikur, kórsangur, matur, myndlist, klædnasnið, mótaframsýning, arkitektur og føroyskur dansur er nakað av tí, tey vitjandi í Føroyahúsinum fríggjakvøldið sleppa at uppliva.

**MENTANARNÁTT**
Føroyingahúsið í Keypmannahavn
Fríggjakvøldið 15/10 kl. 18.00

## LAWTON Í HAVN

John Lawton, sum hevur verið sangari í rockbólkinum Uriah Heep, hevur leygarkvøldið konsert í Sjónleikarhúsinum í Havn. Konsertin verður saman við føroyska bólkinum Deiggj, sum áður hevur spælt saman við Lawton. Bretski sangarin og føroyski bólkurin fara saman at tulka sangir hjá uriah Heep.

**LAWTON OG DEIGGJ**
Sjónleikarhúsið í Havn
Leygarkvøldið 16. oktober kl. 22

